

BYGGISKRÁ August 2018

MIÐNÁM Á KAMBSDALI

Nýbygging og útbygging – 3. byggistig

LANDSVERK

INNIHALD

1.0	Inngangur	3
1.1	Verkevni	3
1.2	Byggiánari og byggiharri	3
1.3	Brúkarar	4
1.4	Virksemi og bygnaður	5
1.5	Byggiøkið	5
1.6	Veðurlag	5
2.0	Skipan av byggimáli	5
2.1	Skipan undir prosjektering	5
2.2	Skipan undir bygging	6
3.0	Fortreytir	6
3.1	Lógargrundarlag	6
3.2	Myndugleikakrøv	6
3.3	Veitingar	7
3.4	Verandi bygningar	7
4.0	Krøv og ynskir til byggimálið	8
4.1	Náttúruvísindaøki	9
4.2	Aula	11
4.3	Felagsøki og matarhøli	12
4.4	Fasa 2 í byggistigi 3	13
5.0	Skipan av byggiøkinum	13
5.1	Lendi	14
5.2	Økið uttanum	14
6.0	Tøkni og veitingar	14
6.1	Veitingar	14
6.2	Innleggingar	15
6.3	Luftskifti	15
6.4	Ljós	16
6.5	Tele- og net	16
7.0	Krøv og ynski til bygningslutir	16
7.1	Konstruktiónir	16
7.2	Framsíður	16
7.3	Tekja	17
7.4	Vindeygu og størri glasumráðir	17
7.5	Skilaveggir	17
7.6	Gólv	17
7.7	Loft	17
7.8	Út- og innhurðar	18

8.0 Krøv og ynski til innbúgv og útbúnað 18
8.1 Aula 19
8.2 Felagshøli og matarsali 19
8.3 Náttúruvísindadeild Fejl! Bogmærke er ikke defineret.
9.0 Heilsa, Trygd og Umhvørvi (HTU) 19
10.0 Fíggjarlig viðurskifti 20
11.0 Tíðarætlan 20
12.0 Rakstur Og Viðlíkahald (ROV) 20
13.0 Fylgiskjøl 23

1.0 Inngangur

1.1 Verkevni

3. byggistig á Kambsdali er seinastu partur í fullføringini av heildarætlanini frá 2012 um út- og umbygging í samband við samanlegging av miðnámsskúlunum á Kambsdali og at lyfta umstøðurnar á Kambsdali á eitt javnbjóðis stig við aðrar miðnámsskúlar.

Heildarætlanin fyri út- og umbyggingina í samband við samanleggingina av skúlunum á Kambsdali bleiv skild sundur í fleiri byggistig. Í tí upprunaligu byggiskránni vóru allar funktiónirnar væl lýstar. Tær, sum blivu útsettar vóru serliga náttúruvísindadeildin, køkurin, kantina, aulan og goymsluplass.

Hetta byggistigi er tískil seinasti partur av heildarætlanini frá 2012 og vísast kann í stóran mun til upprunaligu byggiskránna. Síðani 2012 er tó nýtt virksemi byrjað á Kambsdali. Serbreyt og FabLab eru sett á stovn og hava hesi økt tørvin á fermetrum til undirvísingarhøli í mun til heildarætlanina frá 2012.

Harafturat eru manglar í 2. byggistigi, sum skulu rættast. Serliga eru tað ferðsluviðurskiftini og høvuðsinngongdin, sum ikki eru nøktandi. Hesin partur av verkætlanini er ikki við í hesi byggiskránni.

Samanlagt verður mett, at við hesum síðsta byggistiginum verður høli størvurin á Kambsdali nøktaður nógv ár fram í tíðina og miðnámsskúlin á Kambsdali hevur tá javnbjóðis umstøður at bjóða næmingunum sum hinir miðnámsskúlarnir í Klaksvík, Tórshavn, Hovi og Vestmanna.

Útfrá teimum fíggjarkørmum, sum eru til taks, so hevur nevndin mett tað neyðugt at býta byggingina upp í tvær fasur. Fasa 1 eru virkisøkir, sum eru mest átroðkandi, t.v.s. náttúruvísindaøkið, felagsøki, aula og køkur. Fasa 1 er kostnaðarmett at rúmast innanfyri verandi karm. Fasa 2 eru tørvir, sum nevndin metir skúlin hevur, men sum eru mettir ikki at rúmast í verandi fíggjarkørmum. Hetta er auditorium til 78 fólk (3 flokkar), umbygging av verandi náttúruvísindadeild og dagføring av matarhøli. Bygginevndin metir, at hóast fígging ikki røkkur til fasu 2, so eigur hendan at vera tikin við í prosjekteringini av verkætlanin, so hesir tørvir eru tiknir við í ætlanini fyri 3. byggistig.

1.2 Byggiánari og byggiharri

Byggiánari:
Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
FO-100 Tórshavn
mmr@mmr.fo

Byggiharri/ráðgevi:
Landsverk
Tinghúsvegur 5
FO-110 Tórshavn
lv@lv.fo

Bygginevnd:
Páll Isholm
Miðnám á Kambsdali – rektari og lærari
pai@kambsdalur.fo

Maria Gregersen
Miðnám á Kambsdali – lestrarvegleiðari og lærari

mgr@kambsdalur.fo

Høgni Holm
Miðnám á Kambsdali – álitisfólk og lærari
hgh@kambsdalur.fo

Verkætlanarleiðari: Kirstin Hansen
Landsverk
kiha@lv.fo

Ráðgevi hjá bygginevnd: Bárður í Baianstovu
Landsverk
biba@lv.fo

Yvirskipaða uppgávan hjá bygginevndini er at tryggja, at starvsfólk og lesandi á Miðnám á Kambsdali fáa virðiligar karmar at nýta og virka undir, og mæla til loysnir í byggimálinum, sum eru í samsvar við hetta og ásettu yvirskipaðu karmarnar.
Bygginevndin skal hava eftirlit við, at valdar loysnir verða framdar í verki.

Arbeiðssetningurin hjá bygginevndini verður at:

- Saman við Landsverki at:
  - seta upp tørv, krøv og ynskir til verkætlanina
  - orða eina byggiskrá, sum skal verða grundarlag undir einum skipanaruppskoti
  - arbeiða innanfyri fastlagda fíggjarkarmin
  - hava eftirlit við, at skipanaruppskot og prosjekt eru í samsvari við tað, sum ásett er í byggiskránni

- At tryggja fakligu góðskuna við atliti at funktiónaliteti, góðskustøði og byggilist og gera tilmæli í hesum sambandi, harundir útvega neyðugar upplýsingar / metingar frá eitt nú brúkarum og/ella øðrum serkønum.
- At viðgera møgulig broytingaruppskot, ið ávirka funktiónalitet, góðsku og byggilist, og gera tilmæli í hesum sambandi.
- At gera tilmæli til arbeiðsánaran, so hvørt sum tær einstøku fasurnar í byggitilgongdini eru loknar.
- Kunna arbeiðsánaran um øll týðandi viðurskifti, so hvørt sum arbeiðið líður.

1.3 Brúkarar

Í sambandi við gerð av byggiskránni, hava brúkarabólkar verið settir til at koma við upplýsingum um framtíðartørvir. Bygginevndin hevur viðgjørt útsagnir og ynskir frá bólkunum, og hevur við støði í hesum sett ynskir og krøv í byggiskránna.

Brúkarabólkar:	**Viðgjørd evni:**
Starvsfólk í køkinum	Køkur
Næmingaráðið	Køkur og matarhøli
Undirvísarar í náttúruvísindaligum fakum	Hølir til náttúruvísindaøki

1.4 Virksemi og bygnaður

Miðnám á Kambsdali er landsstovnur, ið er úrslit av samanlegging millum Studentaskúlan og Handilsskúlan á Kambsdali 1. august 2015. Í 2. byggistigi varð dentur lagdur á sjálva samanleggingina, meðan 3. byggistig leggur dent á at skapa neyðugu karmarnar, sum verandi virksemi á Kambsdali krevur og dagføra skúlan, so hann hølisliga er á hædd við aðrar miðnámsskúlar í landinum.

Á Kambsdali starvast um 80 starvsfólk og dagliga eru gott 500 næmingar á skúlanum. Fyrsti parturin av skúlanum, sum er gamli Handilsskúlin var tikin í nýtslu í 1990, annar parturin, sum er gamli Studentaskúlin, bleiv tikin í nýtslu í 1993 og samanbyggingin bleiv tikin í nýtslu í 2016.

Á Kambsdali eru seks útbúgvingarbreytir, sum eru skipaðir í 24 flokkar. Breytirnar eru búskaparbreyt, FHS yrkisnám, fyrireikingarbreyt, hugbreyt, náttúrubreyt og serbreyt. Harumframt so bjóðar skúlin kvøldskúla og akademiútbúgvingar. FabLab á Kambsdali er eisini partur av virksemi skúlans.

1.5 Byggiøkið


Byggiøkið eru matrikklarnir 871cl og 871h á Kambsdali. Byggiøkið er samanlagt 13.738 m².

1.6 Veðurlag

Dominerandi ættin á Kambsdali er útsynningur. Vindmátingar seinastu 100 árini hava víst upp til 67 m/s. Stranga veðurlagið á kambsdali eigur at havast í huga í sambandi við hesa verkætlanina.


2.0 Skipan av byggimáli

2.1 Skipan undir prosjektering



Útbjóðingarháttur:
Verkælanin verður boðin út í høvuðsráðgeving.

2.2 Skipan undir bygging



Útbjóðingarháttur:
Verkætlanin verður boðin út í høvuðsarbeiðstøku.

3.0 Fortreytir

3.1 Lógargrundarlag

Víst verður til Løgtingsmál nr. 112/2017: Uppskot til løgtingslóg um at umbyggja og útbyggja miðnámsskúlan á Kambsdali.

3.2 Myndugleikakrøv

Har inntriv vera gjørd í verandi konstruktiónir, innleggingar og skipanir skulu hesar fylgja almennu byggisamtyktini, umframt serstøku byggisamtyktini fyri økið. Umbyggingin skal fylgja føroysku bygningskunngerðini BK17 og øðrum viðkomandi faknormum og vegleiðingum fyri ávísu umbyggingarnar.

Ráðgevi skal eftirkannað og tillaga viðløgdu tekningar til verandi umstøður á staðnum. Møguligar skrásetingar og uppmátingar skulu vera íroknaðar tilboðnum.

Verða átøk gjørd á berandi bygningslutir, skulu statiskar útrokningar fyriliggja, sum trygd fyri at bygningarnir varðveita ella betra sín verandi statik.

Ráðgevi skal skipa fyri at, viðløgdu HTU skjøl vera arbeidd inn í verkætlanina soleiðis, at hesi eru klár hjá høvuðsarbeiðstakara at arbeiða víðari við undir bygging.

3.3 Veitingar

Víst verður til www.kortal.fo ísv. verandi tøkniligar veitingar, vatn, kloakk og frárensl í økinum.

3.4 Verandi bygningar

Miðnám á Kambsdali eru tríggir bygningar, sum eru samanbygdir. Samanlagt eru bygningarnir 3.186 m² í grundvídd.

Fyrsti bygningur á økinum var Handilsskúlin. Handilsskúlin var bygdur í 1989, arkitekur var Arkitektavirkið Árni Winther, konstruktiónsverkfrøðingur var Preben Hansen, HVS verkfrøðingur var Sofus M. Jacobsen og El-verkfrøðingur var Viggo Akraberg Hansen.



Annar bygningur var Studentarskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy. Skúlin var bygdur í 1993, arkitektur var Albert Isfelt og Gudmund S. Hansen, konstruktiónsverkfrøðingur var Ráðgevingarstovan, HVS verkfrøðingur var Martin E. Leo og El-verkfrøðingur var Oddbjørn Vágslíð.



Triðji bygningurin var fyrisitingarbygningur og samanbygging av Handilsskúlanum og Studentarskúlanum. Bygningurin var bygdur í 2016, arkitektur var Kontrast, konstruktiónsverkfrøðingur og El-verkfrøðingur var Landsbyggifelagið og HVS verkfrøðingur var Sofus M. Jacobsen. Í 2016 var eisini bygningur til Kreativu deild bygdur upp at auluni í Studentarskúlanum.



Við at samanbyggja allar bygningarnar, eru gjørd inniliggjandi útirúm ella garðar. Garðarnir eru samanlagt 660 m2 í grundvídd. Garðarnir eru partvíst græslendi og flísa/ betongdekk.

Støðulýsingar av verandi bygningunum fáast við at venda sær til Landsverk.

4.0 Krøv og ynskir til byggimálið

3. byggistig umfatar ný- og útbygging av trimum virkisøkjum. Hesi eru:

Náttúruvísindaøki
Aula
Matarhøli og felagsøki
Fasa 2 í 3. byggistigi

Við byggingini verður dentur lagdur á at betra munandi um umstøðurnar á Náttúruvísidaøkinum, sum hevur stóran tørv á betri undirvísingarhølum, starvsstovum og hølum til lærarafyrireiking. Lagt verður upp til at náttúruvísindaøkið verður nýbygging. Í samband við bygging av náttúruvísindaøkjum, hevur Bygningsstyrelsen framleitt eina rød av krøvum og tilráðingum bæði til bygging og til innbúgv. Hesi krøv og tilvísingar skulu hugsast inn í hesa verkætlan. Víst verður til fylgiskjal 03_Krav og anbefalinger til laboratoriebyggeri og fylgiskjal 04_Inventar i laboratorier.

Dentur verður eisini lagdur á at fáa auluna og matarhøli at samvirka betri, so hølini kunnu gagnnýta hvørt annað. Í dag er hetta ikki møguligt. Tørvur er tí á einum felagsøkið, sum kann gera hetta og sum eisini vil geva skúlanum ein miðdepil, har allir næmingar kunnu samlast ísenn. Aulan er verandi rúm, har lagt verður upp til at hendan verður dagførd, umvæld og nýmótansgjørd. Matarhøli er eisini verandi rúm, og lagt verður upp til at hetta verður varðveitt, sum tað er í dag. Felagsøki er hugsað sum partvíst nýbygging og samanbygging.

Í "Fylgiskjali 01_Samband millum virkisøkini" sæst, hvussu virkisøkini eru staðsett í dag, og hvussu bygginevndin ynskir sær hesi staðsett frameftir, sum íblástur til loysn av verkætlanini.
Heitini í sær sjálvum lýsa virkisøkini, men verða krøv og ynski til virkisøkini lýst í eftirfylgjandi brotum.
Víst verður eisini til Fylgiskjal 02_Rúmskrá, har krøv og ynskir eru sett upp í yvirlit.

Eftirfylgjandi brot og Rúmskráin er býtt sundur í fasu 1 og fasu 2. Fasa 1 umfatar pkt. 4.1 til 4.3, sum skulu við í verkætlanina, meðan fasa 2 umfatar pkt. 4.4, sum skal hugsast inn í verkætlanina, men sum ikki verður bygt.

4.1 Náttúruvísindaøki

Byggjast skulu nýggj undirvísingarhølir við tilhoyrandi hølum til lívfrøði, evnafrøði, alisfrøði og lívtøknifrøði.

Tørvur er á fýra undirvísingarhølum við starvsstovu-oyggjum, trimum fyrireikingarhølum við starvsstovu-oyggjum, eini vát-starvsstovu við hjalli og eini ser-starvsstovu til lívtøknifrøði.
Afturat hesum er ynski at byggja auditorium og landafrøðisavn, men kemur hetta undir fasu 2.

Mælt verður til at byggja náttúruvísindaøkið í tveimum hæddum.
Ynskiligt er at býta hæddirnar sum fylgjandi:

1.	hædd:	Tvey undirvísingarhølir
		Tvey fyrireikingarhølir
2.	hædd:	Tvey undirvísingarhølir
		Eitt fyrireikingarhøli
		Vát-starvsstova
		Ser-starvsstova

Atgongd millum náttúruvísindaøkið og verandi skúla skal vera skilagóð, opin og náttúrlig. Um bygningurin verður í tveimum hæddum er upplagt at verandi lift eisini kann nýtast í nýggja bygninginum. Somuleiðis er hugsað, at nýggi bygningurin ikki hevur vesir (undantikið vesi til fólk við rørslutarni), men at stutt er til vesir í verandi bygningi.

Undirvísingarhøli við starvsstovu-oyggjum
Stødd á undirvísingarhølum skal vera uml. 100 m2. Hvørt undirvísingarrúm skal rúma 26 næmingum og einum undirvísara. Undirvísingarrúm skulu innrættast við einum undirvísingarparti og einum starvsstovuparti. Faldiveggur skal vera millum báðar partarnar, soleiðis at undirvísingarhølið kann gerast ein undirvísingarstova og ein starvsstova ísenn, sum virka sum tvey óheft rúm.

Øll undirvísingarhølir skulu kunna myrkaleggjast.

Undirvísingarpartur:
Undirvísingarpartur skal innrættast við undirvísingarborðum og -stólum til 26 næmingar, umframt pláss til undirvísara. Undirvísari skal hava starvsstovu-oyggj sum katetur og taburett. Undirvísari skal hava talvu (krit ella whiteboard) við talvuljósi, og Touch-screen talvur 84". Undirvísingarpartur skal vera væl útgjørdur við el-stikkum til næmingar og undirvísarar. Gott arbeiðsljós skal vera við starvsstovu-oyggj.
Útgreinan av útgerð í starvsstovu-oyggini sæst í fylgiskjali 02_Rúmskrá.

Starvsstovupartur:
Starvsstovupartur skal innrættast við trimum starvsstovu-oyggjum, sum hvør skal rúma 8 næmingum.
Gott pláss skal vera millum oyggjarnar, sambært vegleiðingum til innrætting av starvsstovum.
Gott arbeiðsljós skal vera við hvørt arbeiðspláss hjá næmingunum. Starvsstovupartur skal eisini innrættast við goymsluskápum, sum hava glashurðar, borðplássi, stinkskápi, brúsu og eygnaskoli.
Gólvfrárenning skal leggjast í rúmið.
Útgreinan av útgerð í starvsstovu-oyggum sæst í fylgiskjali 02_Rúmskrá.

Tvey av fýra undirvísingarhølunum skulu innrættast til lívfrøði, harav annað eisini er eykastarvsstova til alisfrøði. Eitt undirvísingarhøli er til evnafrøði, og eitt er til alisfrøði.
Útgerðin í starvsstovu-oyggjum og starvsstovupartinum er tengd at, hvørjum faki undirvísingarhølið er ætlað til, sí fylgiskjal 02_Rúmskrá.

Fyrireikingarhølir:
Stødd á fyrireikingarhølum skal vera uml. 30 m². Innrættast skulu trý fyrireikingarhølir, eitt til lívfrøði, eitt til evnafrøði og eitt til alisfrøði. Ynski er at fyrireikingarhøli til lívfrøði er 10-15 m² størri enn hini rúmini.

Fyrireikingarhølini eru ætlaði til undirvísararnar, at fyrireika undirvísingina og gera ymsar starvsstovuroyndir. Rúmið skal eisini nýtast sum goymslurúm til útgerð og evnavørur.
Rúmið skal liggja í beinleiðis sambandi við undirvísingarhøli. Gólvfrárenning skal vera í rúminum.

Fyrireikingarhølini skulu innrættast við starvsstovu-oyggj, stinkskápi (øll uttan alisfrøði), vaskimaskinu, vaski, skrivstovuborði og –stóli, hillum til bøkur, rulliborðum, goymsluskápum við glashurðum og evnavøruskápi.
Útgreinan av útgerð í starvsstovu-oyggum sæst í fylgiskjali 02_Rúmskrá.

Vát-starvsstova við hjalli:
Vát-starvsstova er sum ein grovkøkur – slagtarí. Stødd á rúminum skal vera uml. 30 m².
Vát-starvsstova skal liggja upp at lívfrøðisstovuni, men ikki neyðugt at vera fysiskt fast í lívfrøðistovuni.
Vát-starvsstova skal innrættast smb. krøvum frá HFS.

Ynski er at terrassa er frammanfyri vát-starvsstovu. Stødd 20 m².

Hjallur skal liggja uppat vát-starvsstovu. Stødd 12 m².

RT vesi:
Vesi til fólk við rørslutarni skal innrættast í náttúruvísindaøkinum. Vesi skal innrættast smb. BK17.
Stødd á vesi skal vera uml. 7 m².

Ser-starvsstova:
Stødd á starvsstovu skal vera uml. 35 m².
Ser-starvsstova skal vera starvsstova, sum fylgir krøvum í mun til eitt GMO-góðkend starvsstovu.
Starvsstova skal brúkast til biotøkni og lívfrøði A-støði. Starvsstova skal rúma 16 næmingum samstundis og einum undirvísara.

Rúmið skal innrættast við tveimum starvsstovu-oyggjum, sum hvør skal rúma 8 næmingum.
Gott pláss skal vera millum oyggjarnar, sambært vegleiðingum til innrætting av starvsstovum.
Gott arbeiðsljós skal vera við hvørt arbeiðspláss hjá næmingunum.
Starvsstova skal eisini innrættast við goymsluskápum, sum hava glashurðar, borðplássi, stinkskápi, brúsu og eygnaskoli.
Gólvfrárenning skal leggjast í rúmið.
Útgreinan av útgerð í starvsstovu-oyggum sæst í fylgiskjali 02_Rúmskrá.

4.2 Aula

Verandi aula er í dag karmur um tiltøk av alskyns slagi so sum felagsløtur, kunning frá leiðsluni til næmingar og lærarar, fyrilestrar, framførðslur, filmsvísing o.l. Aulan rúmar millum 400 og 450 fólkum partvíst uttan stólauppstilling, tá hesi sita tætt saman. Aulan er vanliga innættað við nøkrum borðum og stólum og hevur eisini tribunu, har umleið 200 sitiplass eru.

Við um- og útbyggingini er ynski at varðveita staðsetingina av auluni og at brúka hesa til somu tiltøk sum í dag. Ynski er tó at umvæla og dagføra auluna, so hendan gerst meiri tíðarhóskandi, spennandi og innbjóðandi.

Ynskiligt er at atkoman inn í auluna á ongan hátt vekir uppmerksemi ella er forstýrandi fyri framførslur, fyrilestrar (aktivitetin), sum eru á pallinum, men at atkoman vendir burtur frá tí rætningi, sum fólkið í salinum hyggur.

Pallurin skal vera bygdur úr flytbærum podium, sum lættliga kunnu takast burtur. Podier skulu lættliga kunna broytast í hædd alt eftir tørvinum. Pallur skal staðsetast soleiðis í aulini, at Kreativa deild kann brúkast sum "backstage".

Aulan skal kunna myrkaleggjast.

Verandi ljósútbúnaður í auluni er ótíðarhóskandi og skal skiftast út. Ljósstýringar skulu innleggjast so m.a. demping av almenna ljósinum verður møguligt. Verandi pallljós, lørit, vørpa og ljóðútbúnaður skal endurnýtast og flytast í mun til nýggju pall-staðsetingina.

Ljóðviðurskiftini í auluni skulu betrast so møguligt er at tilpassa ljóðið alt eftir virkseminum í auluni. Ljóðtillagingar í rúminum skulu kunnu gerast á ein einfaldan og lættan hátt.

Aulan skal kunna víðkast við at rúm 4.2 Felagsrúm og matarhøli verður partur av auluni einans við at lata hurðar upp millum bæði rúmini. Hetta kann gerast við m.a. dragihurð, faldiveggi ella skjótihurð. Sí fylgiskjal 01_Samband millum virkisøkini.

Goymsla til auluna:

Goymsla knýtt at auluni skal finnast í verandi bygningi. Goymslan skal vera eitt verandi rúm, sum uttan stórar útreiðslur, verður umskapað til eina funktionella goymslu. Hurð inn til goymslu skal vera í minstalagi 1,8 m.

Lagt verður upp til at køkurin beint við auluna ella rúm 108 verður tikið til goymslu. Sí fylgiskjal 01_Samband millum virkisøkini.

4.3 Felagsøki og matarhøli

Undir felagsøki og matarhøli er talan um nýtt felagsøki, verandi matarhøli og køk. Í dag eru aula og matarhøli skilt sundur við einari langari gongd og hava av tí sama einki beinleiðis samband, sum er til gagn fyri hesi bæði rúmini. Nýggja felagsøkið skal tískil vera samanbindandi rúm millum verandi aulu og matarhøli.

Felagsøki og matarhøli:
Nýggja felagsøkið og verandi matarhølið skulu vera eitt samanhangandi rúm. Felagsøkið skal vera eitt skiftandi rúm frá at vera matarhøli, arbeiðsrúm hjá næmingum ísv. bólkaarbeiði, hugnaøki til lesandi, til lættliga at kunna umskapast til rúmligt rúm í sambandi við stevnur, básauppstilling til framsýningar og verkætlanarvikur v.m. Felagsøki skal lættliga kunna samanbindast við Auluna sum hjáliggjandi rúm – t.d. sum forrúm ísv. fyrilestrar, framførðslur, konsertir v.m. Sí tekst í pkt. 4.1 Aula.

Ynskiligt er at nýggja felagsrúmið verður eitt rúmligt og opið rúm, ljóst og innbjóðandi. Innrættast skal speakers corner - lítla sena. Eisini skal felagsrúm útgerast við stórskýggja og ljóðútgerð, sum kann vísa virksemi í auluni, tá tiltøk eru har. Stødd á felagsrúmi skal vera uml. 280 m²

Verandi matarhøli kann varðveitast, sum hetta er í dag. Ynski er at matarhøli fellur væl saman við felagsøkinum og at hesi rúm virka sum eitt rúm. Verandi matarhøli rúmar umleið 152 sitandi fólkum ísenn, sum er ov lítið til virksemið. Tískil skal felagsøkið eisini brúkast til matarhøli, so pláss verður fyri umleið 300 sitandi fólkum ísenn.

Køkur:
Køkurin á skúlanum er og lítil til verandi virksemi á skúlanum. Grundað á plásstrot er logistikkurin ikki nøktandi, har m.a. matargoymsla (turr- og frystigoymsla) og ruskgoymsla eru staðsett í kjallarahæddini, langt burtur frá køkinum. Partar av útgerðini í køkinum mugu skiftast út.

Tørvur er á at betra um logistikkin í køkinum. Matargoymslan og ruskgoymslan skulu staðsetast saman við køkinum tvs. á somu hædd. Ynski er at køkurin fær eina oyggj sum arbeiðast kann rundan um. Ynski er somuleiðis, at køkurin verður meiri "opin" út móti matarhøllini.

Køkurin skal rúma tilgerð av uml. 100 døgurðarættum dagliga, umframt ger av sandwitch, frukt og salati til salatvognar, morgunmatarborð, suppur o.l.

Tørvur er á at útsølustaðið verður dagført, so næmingar sjálvir í størri mun fáa sær mat á tallerkar, viga hendan og gjalda eftir vekt við gjaldskorti.

Tørvur er somuleiðis á, at næmingar sjálvir rudda eftir sær og bera skitnan útbúnað til eina fasta støð. Her frá skal vera lættur og stuttur avstandur inn í uppvaskirúmið í køkinum.

Tørvur er eisini á einum staðið, har næmingar kunnu tilgerða/hita sín egna mat við t.d.- mikrobylgjuovni, toastara v.m.. Pláss skal vera fyri drykki- og góðgætisautomatum nær við útsølustaðið.

Ynski er at matarstað hjá starvsfólkum verður í starvsfólkarúminum í fyrisitingarbygninginum og at umklæðingarrúm og starvsfólkavesir vera varðveitt í kjallarahæddini. Sostatt koma hesi rúm at liggja nakað burtur frá køkinum.

Køkurin skal innrættast smb. krøvum frá avvarðandi myndugleikum.

Lagt verður upp til at køkurin verður staðsettur har hesin er í dag. Fyri at økja um fermetrarnar er møguligt at taka reingerðarrúm og ein part av gongdini upp í køkin. Sí fylgiskjal 01_Samband millum virkisøkini.

4.4 Fasa 2 í byggistigi 3

Auditorium:
Auditorium skal rúma 78 næmingum og einum undirvísara. Auditorium skal innrættast við tribunustólum og borðum til næmingar og góðum plássi frammanfyri tribunu til undirvísarar.
Í auditorium skal vera uppvørpa, fjarstýrt lørit og hátalarar umframt krittalva, sum kann lyftast upp og niður í hædd. (Touch-screen). Undirvísari skal hava pult, sum kann heva og senka.

Auditorium skal kunna myrkaleggjast. Ynski er at kunna dempa ljósið í rúminum. Gott ljóð skal vera í rúminum. (Black box)
Stødd um 80-100 m².

Landafrøðisavn:
Landafrøðisavn er savn av gróti, gomlum instrumentum av ymsum slagi, kort í rullum, globus v.m. Ynski er at savnið verður sjónligt fyri næmingar og undirvísarar á skúlanum og skulu lutirnir útstillast har flest fólk síggja hesar. Hetta merkir at talan er ikki um serstakt rúm til savnið, men at gongin millum undirvísingarrúm, starvstovur, auditorium o.l. verður brúkt sum útstillingarstað.

Lutir skulu útstillast í glasmontrum við ljósi í. Ynski er at lítið dagsljós kemur á lutirnar, sum kunnu farast av beinleiðis sólarljósi. Allir lutur skulu vera í avlæstum montrum.

Umbygging av gomlu náttúrudeildini:
Gamla náttúruvísindadeildin skal umbyggjast, so hon kann hýsa Fablab verkstovuni, undirvísingarhølum og vaskirúmi.

5.0 Skipan av byggiøkinum

Byggiøkið er alt økið kring verandi bygningar á matrikkul nr. 871h og 871cl á Kambsdali. Ásetingar í BK17 umframt serligar ásetingar frá avvarðandi myndugleikum, so sum frástøður frá vegum, áum v.m. skulu haldast.

Serstøku krøvini til atkomumøguleikar hjá tilbúgvingini skulu fylgjast. Samskiftast skal við Fuglafjarðar kommunu um hesi viðurskifti.

5.1 Lendi

Økið kring verandi bygningar er partvíst hagalendi og partvíst planerað økið.
Lendið skal kannast, drenast og viðgerast smb. galdandi krøvum. Uppfylling og steinseting skal m.a. tryggja, at væta á ongan hátt treingir inn í bygningin frá undirlendinum.

5.2 Økið uttanum

Uttanumsøkið skal passa til verandi lendi sum er hagalendi. Allur gróður skal haldast væl burtur frá bygningum, so hesin ikki ger seg inn á dren og fyllu kring bygningin.

Uppfylling millum gróður og bygning skal vera tilfar, sum ikki kann takast av vindi. Sera nógvur vindur er javnan á Kambsdali, har m.a. skervur lættliga fer á flog og ger skaða á bygningar og bilar í økinum.

Við allar úthurðar skal gólvhæddin vera áraka lendishæddini (niveaufrítt). Rist við frárensl e.l. skal leggjast við úthurðar, so gott hall kann tryggjast út frá bygningi samstundis við, at krav um atkomuviðurskifti verður hildið.

Allar uttandura rýmingarleiðir skulu áleggjast við asfalti ella øðrum tilsvarandi sløttum tilfari. Ásetingar um uttandura rýmingarleiðir skulu fylgjast og góðkennast av avvarðandi myndugleika.

6.0 Tøkni og veitingar

Skipanir/útbúnaður/stýringar skulu lýsast og veljast í mun til livitíð, viðlíkahald, burðardygd og heildarkostnað, eisini við atliti at orkunýtslu. Harumframt skulu skipanirnar/útbúnaðurin setast soleiðis, at rakstur og viðlíkahald kann gerast á nøktandi hátt.

Niðan fyri nevndu skipanir/útbúnaður skal lúka nevndu krøv, umframt at fylgja viðkomandi faknormum.

6.1 Veitingar

Allar veitingar, so sum el, vatn, tele, kloakk eru í verandi bygningum, og skal byggingin knýtast í hesar. Kannast skal, um verandi veitingar eru nøktandi til um- og útbyggingina og skulu tillagast eftir tørvi. Krøv sambært Fuglafjarðar kommunu skulu fylgjast.

Skipanir skulu fyrireikast og gerast, so at byggingin er so orkuvinalig sum til ber í mun til upphiting og rakstur.

Útgreinað krøv til veitingarnar eru partur av framhaldandi arbeiðinum og verða at skjalfesta sambært viðkomandi faknormum.

6.2 Innleggingar

Allar innleggingar skulu prosjekterast við støði í galdandi normum og standardum.
Bindast skal í verandi skipanir sambært krøvum frá Fuglafjarðar kommunu.
Innleggingar skulu skipast soleiðis, at neyðug røkt av skipanum kann gerast á fullgóðan hátt.
Innleggingar skulu í størst møguligan mun leggjast soleiðis til rættis, at innrætting, rakstur og viðlíkahald gevur minst møguligt órógv fyri virksemi og brúkarar í húsinum, harumframt skal øll útgerð í størst møguligan mun verða orkuvinalig.

Innleggingar til bygningin eru m.a.:
Hiti, vatn, kloakk og el.

Hiti: Skipanir skulu fyrireikast og gerast, soleiðis at minst møgulig orka verður brúkt til upphiting og rakstur av bygninginum.

Verandi hitaskipan skal brúkast í tann mun kapasitetur er tilstaðar. Um tørvur er á meiri orkukeldu skal hendan vera varandi orka.

Hitaskipanin skal skipast við uppdeiling og stýringum, ið tryggja skynsama upphiting av bygninginum í mun til veður, virksemi o.a.

Vatn: Drekkivatnsskipanir skulu skipast soleiðis, at krøv til drekkivatn altíð eru rokkin, og at tryggjað er ímóti tæring í skipanini. Partar av vatnskipanini, ið ikki brúka vatn vanliga, t.d. brandskáp, spulikranar og tílíkt, skulu verða íbundin á ein hátt, at krøv til drekkivatnsgóðskuna støðugt eru rokkin fyri aðrar skipanir.

Frárenningar: Frárenningar í bygninginum skulu skipast í størst møguligan mun soleiðis, at tørvur ikki er at pumpa frárenningar. Verður neyðugt við pumpum, skulu tær staðsetast uttan fyri bygningin.

El: El skipanin skal nøkta allar skipanir í mun til virksemi í bygninginum. El skipanir skulu tillagast virkseminum við atliti at fleksibiliteti í mun til framtíðar rakstur og røkt á best møguligan hátt.

Føringsvegir: Allir føringsvegir skulu leggjast til rættis, soleiðis at innleggingar eru væl skipaðar og ruddiligar og lætt atkomuligar fyri broytingum og útbyggingum.

Innleggingarbakkar skulu taka atlit at ymisku skipanunum, soleiðis at tær eru skipaðar hvør sær á skynsaman hátt. Føringarvegir skulu brunatryggjast í mun til brunaflokkar. Gamlar leiðingar, ið nomið verður við, skulu skiftast út.

6.3 Luftskifti

Luftskiftisskipanir skulu prosjekterast við støði í galdandi normum og standardum.

Luftskiftisskipanin skal skipast við uppdeiling og stýringum, ið tryggja skynsamt luftskifti í bygninginum í mun til veður, virksemi o.a.

6.4 Ljós

Atlit skulu takast til náttúrligt ljós og ljósútbúnað. Val av glasfeltum og ljósútbúnaður skal umhugsast í mun til myrkalegging, blending, sólarhita v.m. Ljós yvir øllum starvsstovu-oyggjum skal vera við innbygdum arbeiðsljósi, uml. 900 lux. RA-virði minst 92.

6.5 Tele- og net

Tele - og netskipan skal leggjast inn í bygningin.

Tráðleyst samband skal vera í um- og útbyggingini sum svara til tørvin í ávísum virkisøkjunum. Fast net-samband skal eisini vera í undirvísingarrúmum, har undirvísari er staðsettur, so telda o.l. kann koblast beinleiðis til net.

Innleggingar ísv. trygdarskipanir skulu leggjast við káplum.

7.0 Krøv og ynski til bygningslutir

Allir bygningslutir skulu gerast, samansetast/byggjast og nýtast sum fyriskrivað í tilhoyrandi reglum, krøvum, vegleiðingum og normum. Útgreinað krøv til bygningslutir er partur av framhaldandi prosjekteringararbeiðinum og skulu skjalfestast sambært viðkomandi faknormum.

Val av tilfari skal vera við høgari góðsku í mun til haldføri og ellisdæmi. Bygningslutirnir hvør sær skulu hava langa livitíð og gerast soleiðis, at viðlíkahaldið er so avmarkað, sum til ber. Niðanfyri eru nakrir bygningslutir nevndir:

Vátrúm, so sum høli til vesirúm, køkur o.l, skulu vátrúmstryggjast.

7.1 Konstruktiónir

Konstruktiónirnar skulu dimensionerast og eftirvísast sambært galdandi faknormum við tilhoyrandi donskum "anneksum". Val av konstruktiónum skal verða kent og tryggjað skynsaman byggihátt.

Atlit skulu sýnast at føroyska veðurlagnum, og skulu konstruktiónirnar dimensionerast til eina vindlast svarandi til 70 m/s. Konstruktiónirnar skulu vera haldgóðar í mun til regn, kava og vind.

Berandi konstruktiónir skulu fyrireikast og gerast við atliti at størst møguligum fleksibiliteti. Berandi betongveggir verða tí bert nýttir í tann mun, hetta er neyðugt fyri ta berandi skipanina og heildarstøðufestið. Konstruktiónir, sum eru úr betong og standa berar, skulu dustbindast.

7.2 Framsíður

Val av tilfari og bygningslutum í framsíðunum skal fremjast við atliti at kendum og haldførum tilfari og bygningsloysnum. Hædd skal takast fyri, at útsjónd passar til umhvørvið og at bygningssniðið er tilpassað veðrinum (sól, regni og vindi) soleiðis, at bygningurin bæði kann gagnnýta og samstundis verjast móti náttúrukreftum.

7.3 Tekja

Tekja skal byggjast úr dygdargóðum tilfari, egnað til føroyska veðurlagið. Takformur skal vera einfaldur og við góðum kendum loysnum. Ynskiligt er, at tekja skal byggjast við halli, har tilfarsval og hall passa væl til føroysk viðurskifti.

7.4 Vindeygu og størri glasumráðir

Val av vindeygum og evt. glasumráðum skal passa til føroyska veðurlagið og vera staðsett skilagott í mun til veður og vind. Hugsast eigur um haldføri og viðlíkahald, soleiðis at livitíðin gerst long. Somuleiðis eigur at hugsast um inniklima og sólávirkan inn í bygningin, bæði ísv. ljós og hita.

Ynski er ikki at hava síðuhongd vindeygu. Tó kunnu hesi nýtast í støðum, har vindur á ongan hátt forðar fyri, at vindeygu kunnu standa frítt opin

7.5 Skilaveggir

Skilaveggir og glasumráðir skulu lúka styrkis-, ljóð- og brunakrøv. Skilaveggir skulu vera lættir og skulu kunna setast upp og takast niður eftir tørvi, uttan at tað ávirkar berandi konstruktiónina. Skilaveggir skulu gerast úr tilfari við neyðugari styrki at bera veggjahongd innbúgv og útbúnað og skulu fyrireikast til hetta. Krav verður sett til at allir út- og innveggir eru klæddir við hørðum gipsplátum ella øðrum tilfari við tilsvarandi yvirflatustyrki. Hornaverja skal setast á øll útvendandi horn.

Gjøgnumføringar í skilaveggjum skulu ljóð- og brunatettast.

Har valt verður innandura glasumráðir, skal glas vera herdað og laminerað trygdarglas. Sjónlig merking skal setast á glasumráðir, sum ger glasveggin sjónligan.

Í vátrúmum og starvsstovum skulu serlig fyrilit havast fyri tættleikanum í øllum rúminum, eisini har ymiskt tilfar verður bygt saman, so sum millum vegg og gólv og í hornum. Á øllum vesum/baðirúmum skulu veggir fórast við vinyl ella líknandi klæðing í vátsonum.

Skilaveggir, sum eru úr betong og standa berir, skulu dustbindast og tryggja góða ljóðgóðsku.

7.6 Gólv

Gólv skal vera úr slitsterkum og viðlíkahaldsløttum tilfari. Gólv skal vera egnað til gólvhita. Gólv á starvsstovum skal vera epoxy ella líknandi gólvklæðing, sum tolir sýru og litevni.
Gólválegging á vesum og køki skal vera gliðtrygt vinyl ella líknandi klæðing.

7.7 Loft

Loftini skulu gerast og fyrireikast soleiðis, at innleggingar goymast. Loftini skulu tryggja góð ljóðviðurskifti, umframt at verða løtt at halda rein. Um træbetong-loft verða nýtt, skulu hesi vera málaði.

Niðurhongd loft skulu kunna takast niður á hóskandi støðum, so tað slepst til tøkniligar innleggingar alla staðni, har tað er neyðugt, og uttan at loftini farast av hesum.

Á baðirúmum og køki skulu loft tola sera nógva vætu. Loft skulu kunna reingerast og málast eftir tørvi. Um ber betongloft verða nýtt, so skulu hesi vera dustbundin og tryggja góða ljóðgóðsku.

7.8 Út- og innhurðar

Úthurðar skulu vera úr góðari góðsku, egnaðar til føroyska veðurlagið og vera "niveau"-fríar. Úthurðar skulu vera slitsterkar og harðførar við góðari gátt. Allar útgangandi úthurðar skulu hava fastan vegg ella aðra verju aftanfyri hurðina, sum skal virka sum hurðastoppari.

Innhurðar skulu vera úr góðari góðsku og egnaðar til nógv lastað brúk, svarandi til skúlabrúk. Innhurðar skulu vera vanligar hurðar og ikki skjótihurðar. Innhurðar skulu vera í minsta lagi M9. Hurðar skulu staðsetast í mun til veggir o.l. sambært krøvum um plásstørv hjá fólki í koyristóli. Sí BK17.
Hurðar inn til baðirúm og køk skulu vera vátrúmshurðar.

Allar hurðar skulu vera við Salto-lyklaskipan og skulu knýtast í verandi skipan hjá skúlanum.

8.0 Krøv og ynski til innbúgv og útbúnað

8.1 Náttúruvísindadeild

Sí eisini útgreining í fylgiskjali 02_Rúmskrá

Starvsstovu-oyggjar skulu verða uttan skáp ella líknandi undir oyggjunum.

Viðv. goymsluskápum í undirvísingarhølum skulu hesi verða gjørd av haldgóðum tilfari.
Skáp skulu so vítt møguligt hava glas í hurðinum og ljós á liti.
Ein partur av skápunum skulu hava skuffur inni á skápinum, lættari at yvirskoða enn hyllar.
Undir teimum høgu skápunum skulu verða sektionir við skuffum.

Borðplátur skulu verða gjørdar úr haldgóðum materiali, skal tola hita og syru/basa.

Trygd:
Gass skal hava ein høvðusavbrótara sum lýkur krøv til starvsstovur.
Allar starvsstovur skulu hava eldsljøkkjara og brandteppi, umframt eygnaskolarar og 1. hjálparakassa.

Centralt skáp til roykdykkaraútgerð, við stórum 1. hjálparakassa og hjartastartara.

Tól:
Ein ísterningamaskina í evnafrøði stovu.
Ein industriel starvsstovu-uppvaskimaskina inni í evna- og lívfrøði stovum.
Køliskáp skal verða inni í fyrireikingarrúmum til lívfrøði og evnafrøði.
Frystiboks (stór 300-400ltr) skal verða inni í fyrireikingarrúmi til lívfrøði.
3 stk stinkskáp, eitt í fyrireikingarrúmi til evnafrøði og eitt í hvørjari evnafrøðistovu.

Viðv. innrætting og val at starvsstovu-útgerð, verður eisini víst til skjøl frá Bygningsstyrelsen, m.a. Krav og anbefalinger til laboratoriebyggeri og Inventar i laboratoriemiljøer, sí fylgiskjál 03 og 04.

8.2 Aula

Ståplistólar til 300 fólk.
Podier, sum lættliga kunnu stillast í hædd. Tørvur er á podium til pall, sum rúmar tónleikaframførslum.
Kamera við tilhoyri, sum hevur samband til stórskýggja í felagsrúmi.

8.3 Felagshøli og matarsali

Innbúgv til fýra bólkarúm til uml. 6 fólk ísenn. Útgreining um slag av innbúgvi skal avtalast við bygginevnd undir prosjektering.
Stórskýggi og ljóðannlegg, sum hevur samband inn í auluna.
Ljóðútgerð til felagsrúm og matarhøli.

8.3.1 Køkur

Nýggj eimhetta
Nýggir kipskókarar – 2 stórir. (70 kg. Í 20 min)
Nýggjan ovn – ein stóran ella tveir smærri (evt. við vaskiskipan)
Nýggjan komfýr – 6 plátur (ikki gass)
Stóra pannu (sjálvstøðuga)

9.0 Heilsa, Trygd og Umhvørvi (HTU)

HTU skal verða ein týðandi partur av verkætlanini í prosjektering, útinning, rakstri og viðlíkahaldi, og starvsfólk skulu hava eitt gott arbeiðsumhvørvi bæði í tilgongdini til verkætlanina, undir bygging og tá bygningurin er tikin í nýtslu.

Skyldur javnført ásetingunum í arbeiðsumhvørvislóggávuni og umhvørvislóggávuni skulu fylgjast.

Tryggjast skal, at ásetingarnar í "*Arbejdsministeriets bekendtgørelse nr. 1017 af 15. december 1993 om indretning af byggepladser og lignende arbejdssteder efter lov om arbejdsmiljø*", ið er sett í gildi fyri Føroyar við "*kunngerð nr. 136 frá 4. september 1995 um reglur fyri byggipláss og líknandi arbeiðspláss*" við fylgiskjølum, verða fylgdar. Listi yvir loysnir innan arbeiðsumhvørvis viðurskifti, sum eru út yvir tað vanliga, skal gerast.

Ráðgevi skal tryggja í prosjektering, at byggiarbeiðið í mest møguligan mun verður framt í vanligari arbeiðstíð, tó kann henda, at neyðugt verður at skipa nakað av byggiarbeiðinum uttan fyri vanliga arbeiðstíð. Skipað samstarv skal verða millum byggifeløg, byggileiðslu, fakeftirlitið og starvsfólk, harundir byggifundir, sum meginregla verða hildnir hvørja ella aðruhvørja viku. Trygdarrunda og fundir verða sum meginregla hildnir 4. hvønn dag.

Tryggjast skal, at byggiarbeiðið verður lagt soleiðis til rættis, at tað sum heild verður til minst møguligan ampa fyri kringumstøðurnar. Arbeiðið skal skipast soleiðis, at tað elvir til minst møguligt óljóð, dálking og ferðslu í umhvørvinum. Fyribils ávísingar og vegleiðandi skelti skulu setast upp í samstarvi við byggiharran og avvarðandi kommunu.

HTU-ætlanin hjá Landsverki skal takast við í felagstreytunum. Sí fylgiskjal 05 HTU-ætlan. Tilfar og upplýsingar til HTU-ætlanina frá ráðgeva og arbeiðstakara skal latast tí, sum vegna byggiharra er HTU-samskipari (trygdar-/arbeiðsumhvørvissamskipari).

10.0 Fíggjarlig viðurskifti

Fíggjarliga rásarúmið fyri verkætlanina er 29,2 mió.kr. Her er kostnaður fyri fasu 2 ikki íroknaður. Kostnaðarmeting fyri fasu 2 er 6 mió.kr.

11.0 Tíðarætlan

Víst verður til fylgiskjal 06_Tíðarætlan

12.0 Rakstur Og Viðlíkahald (ROV)

Endamálið við rakstrar- & viðlíkahaldsætlanini er at tryggja eitt framhaldandi, nøktandi viðlíkahald. Viðlíkahaldið skal leggjast til rættis og passast til raksturin av bygninginum annars. Í samljóði við funktiónskrøvini í byggiskránni, skal viðlíkahaldsstøðið verða viðvirkandi til at røkka dygdar- og haldgóða bygging:

Byggiharri krevur í hesari verkætlan talgilda avhendan. Tað er galdandi fyri allar upplýsingar, sum hava beinleiðis ávirkan á framtíðar rakstrarskeiðið. Treytirnar eru galdandi fyri allar arbeiðstakarar í verkætlanini.

Í hesum stykki eru yvirskipað krøv lýst, við tí endamáli at halda funktionella og fíggjarliga virði í bygningi og fríøkjum, herundir byggilist, -tøkni og dygd.

Prosjektering (ROV)
Bygningurin skal sniðgevast og gerast, soleiðis at rakstur og viðlíkahald av bygninginum verður skynsamt. Val av tilfari skal stuðla upp undir skynsaman rakstur og viðlíkahald, umframt at val av tilfari skal tryggja:

- Eitt optimalt inniklima, uttan ampar av innandura flatum, herundir: gólv, veggir, loft v.m. sum fæst í samarbeiði við brúkara og rakstrarskipanina, grundað á tær veittu vegleiðingar og fyriskipanir frá arbeiðstakara.
- Ein tættan og byggitøkniliga rætt útførdan klimaskerm.
- Góðar og tryggar umstøður fyri brúkarar og gestir í bygningi og útiøkjum.
- Vælvirkandi og orkurættar tøknuligar innleggingar.

Allir lutir, ið krevja reingerð, ansing og røkt, skulu verða atkomuligir og skulu verða settir soleiðis, at arbeiðið at reinsa, ansa og røkja lutirnar/skipanirnar er trygt og nøktandi, herundir:

- Luftskiftisrør og rør í síni heild skulu verða sett so, at tað er møguligt at reinsa og røkja rørskipanina.
- Eftirlitslúkur herundir El-, HVS-, Ventilatión-, v.m.
- Talvir og skýggjar fyri El-, HVS-, Ventilatión-, v.m.

- Allar tøkniligar lutir v.m.

Gransking (ROV)
Valdar loysnir skulu granskast og verkætlanartilfarið skal góðskutryggjast viðvíkjandi rakstri og viðlíkahaldi fyri allar fasur í prosjekteringini.

Gransking skal sum minsta mark fevna um:
- Inniklima
- Fólkatrygd
- Reingerð
- Viðlíkahald
- Rakstur
- Kostnað av teim oman fyri nevndu

Góðskutrygging skal sum minsta mark innihalda:
- Nøktandi støði á verkætlanartilfari
- Samanstoytsgreining millum fakbólkar
- Greið og fullfíggjað markamót
- Samsvar millum tekningar
- Samsvar millum skjøl
- Tíðarætlan
- Kostnaðarætlan

Avhendan (ROV)
Verkætlanin skal prosjekterast í Revit og hava ráðgevar til uppgávu at lata byggiharranum allar tekningar "sum bygt" av bygninginum eftir nærri avtalu við byggiharran og IKT avtalu.

Harumframt hava ráðgevar og arbeiðstakarar ábyrgdina av, at øll rakstrar-, eftirlits- og vegleiðingarskjøl (REV) verða latin byggiharranum.

Øll viðkomandi skjøl skulu veitast í forsnið, sum greitt frá í IKT avtalu. Skjøl sum skulu veitast eru:

Vegleiðingar fyri REV:
- Upplýsingar um allar byggilutir, elementir og komponentar, sum kunnu vegleiða rakstrarstarvsfólki í dagligum brúki, eftiransan og viðlíkahaldi.
- Allir byggilutir, elementir og komponentar skulu nágreinast viðv. uppbygnað og funktión. Eisini skal væntað viðlíkahald, tíðarskeið, brúk og veitari upplýsast.
- Evt. kunnan, upplæring og skeið.

Viðlíkahaldsætlan
- 10 ára viðlíkahaldsætlan skal veitast

Ætlan um rakstrarkostnað
- Skjøl um væntaðan kostnað av rakstri, veiting, orkunýtsla og reingerð
- Meting um rakstrarkostnað skal gerast fyri 10 ára skeið, við kostnaðarstøði frá avhendingardegi.

Garantiskjøl

- Allar givnar ábyrgdir/trygdir, herundir einkultvøra og samansettir byggilutir, skulu latast til byggiharra, við avhendan.

Dátubløð

- Rakstrarviðkomandi vørufrágreiðingar, serliga veitarans vørublað.

Byggilutakort og sermyndir av samanbyggingum

- Veruligir upplýsingar um byggilutir og komponentar, og herundir rakstrar- og viðlíkahaldsupplýsingar.

Innregulerings-, máti- og royndarfrágreiðingar

- Innregulering-, máti- og royndarfrágreiðingar, sum eru gjørdar, tá ið farið verður í gongd við verkløg.

"Sum bygt" tekningar og diagramm

- Allar tekningar og diagramm, sum nýtt eru í sambandi við bygging, uppseting og tá ið farið verður í gongd við bygningar og verkløg.
- Avtaluseðlar og skitsur.

"Sum bygt" myndir

- Allar myndir frá byggibyrjan til avhending
- Myndir frá eftirlitinum
- Myndir frá arbeiðstakara / veitara
- Myndir frá byggileiðslu

Gransking og góðskutrygging

Ein góð gransking av eini verkætlan, er ein fortreyt fyri einum góðum úrsliti. Gransking skal verða framd, meðan prosjekteringin er ávegis. Somuleiðis skal granskingin fylgja byggingini og veiting av byggieindum.

Gransking fevnir um innanhýsis gransking og tvørfakliga gransking. Byggiharrin setur uttanhýsis gransking á verkætlanina - sí tíðarætlan. Alt framleitt tilfar skal veitast byggiharra og uttanhýsis granskarum í uppruna forritum so sum Revit, Word e.l fyri hvørt granskingarstig. Hetta er galdandi fyri byggiharra, byggiharraráðgeva og allar teir prosjekterandi partarnar fyri øll fak.

Minstamark fyri ráðgevaragransking eru ásetingarnar í "Ydelsesbeskrivelser 2012 – For Byggeri og Planlægning" kap. 3.
Fyri hvørt stig í prosjekteringini skal gransking fremjast og frágreiðing latast byggiharranum. Farast skal ikki undir næsta stig, fyrr enn góðkenning av undanfarna stigi fyriliggur frá byggiharra, og viðmerkingar eru arbeiddar inn í undanfarna stig.

13.0 Fylgiskjøl

Fylgiskjal 01_ Samband millum virkisøkini
Fylgiskjal 02_ Rúmskrá
Fylgiskjal 03_Krav og anbefalinger til laboratoriebyggeri
Fylgiskjal 04_Inventar i laboratoriemiljøer
Fylgiskjal 05_HTU-ætlan
Fylgiskjal 06_Tíðarætlan